
Við Smyrli til Stórabretlands

Aftur í ár ber til at uppliva Stórabretland við Strandferðsluni. Farið verður við Smyrli til Scrabster, hadani vit skipa fyri bussferðum víðari.

Føroyskir ferðaleiðari verður við á øllum ferðum, og bussarnir eru vælútgjørdir við toiletti, air condition, kaffi- og teautomatum og setrum, ið kunnu leggjast niður

Í ár eru 4 ymiskar ferðir at velja ímillum.



KINROSS 23. juni – 02. juli

Fyri lívsnjótarar, ið hava hug til eitt sindur av hvørjum. – Njótið eina viku á luksushotellinum Green Hotel í Kinross, ein tíma koyring norðan fyri Edinburgh. Hotellið er sera vælútgjørt við ollum hentleikum, eitt nú hitaðum svimjihyli og golfvølli. Nógvir fritíðarmøguleikar í vøkrum friðarligum umhvørvi. Skipað verður fyri 3 útferðum, eitt nú til Edinburgh.

Vaksin **kr 4.600,-**
Børn u. 14 ár **kr 2.900,-**

Prisurin fevnir um ferð við smyrli í 4-koyggjukamri koyring til Kinross og aftur, hoteluppihald við 1/2 pensión, 3 útferðir

***undantikið Kinross - ferðina**

NEWTONMORE 30. juni – til 09. juli

Nakað fyri øll, ið hava hug og ans fyri náttúruni. Newtonmore liggur í Spey dalinum í Miðskotlandi, einum av náttúruvakrastu plássum í Skotlandi yvirhøvur. Gist verður á tí hugnaliga Balavil Sports Hotel, og skipað verður dagliga fyri útferðum til eitt nú Edinburgh, Aviemore og oynna Skye.

Vaksin **kr. 4.980,-**
Børn u. 14 ár **kr. 3.650,-**

Prisurin fevnir um ferð við Smyrli í 4-koyggjukamari, koyring til Newtonmore og aftur, hoteluppihald við 1/2 pensión, útferðir

LONDON 07. Juli – 16. juli

Rætta fritíðarvalið fyri tey, ið hava hug á stórbýarlívinum. Í hesum verðinbýi er mangt og hvat at síggja og fara til; ikki ber til at greiða frá øllum her. Gist verður á 3 stjørna Bailey's Hotel í Kensington, einum av hjørtunum í London. Fyri tey áhugaðu verður skipað fyri útferðum og tiltøkum bæði fyri ung og gomul.

Vaksin **kr. 5.290,-**
Børn u. 14 ár **kr 4.300,-**

EDINBURGH TATOO 11. aug. – 20 aug.

Ein ógloymandi ferð fyri tey, ið hava hug at uppliva rættiligt skotskt veitslulag. Edinburgh Tatoo, ið verður hildið hvørt ár, setir rættan ólavsøkudám á býin. Mikið skemt og náttarlív, gøtuundirhald, fýrverkarí og konsertir – fyri bert at nevna nøkur av teimum nógvu tiltøkunum. Gist verður á 3 stjørna Palace Hotel á Princess Street við frá líkum útsýni til eitt nú viðagitna Edinburgh Castle

Vaksin **kr. 4.680,-**
Børn u. 14 ár **kr. 3.695,-**

Prisurin fevnir um ferð við Smyrli í 4-koyggjukamari, koyring til Edinburgh og aftur, 2 døgurðar, hoteluppihald við 1/4 pensión, Tatoo Show.

STRANDFARASKIP LANDSINS
Ferðamannadeildin
Yviri við Strond 6 – box 88
110 Tórshavn
tlf. 1 4550, Tfx. 1 6000, Tlx. 81295

STRANDFARASKIP LANDSINS
Norðoya deild
Á stonganum
700 Klaksvík
Tlf. 5 7566, Tfx. 5 6006

Allar bussferðir eru treytaðar av nóg stórari luttøku.

Ferðaætlan 1989

	Koma	Fráferð											
Tórshavn Friggjadag		19:00	16/06	23/06	30/06	07/07	14/07	21/07	28/07	04/08	11/08	18/08	25/08
Scrabster Leygardag	08:30	21:00	17/06	24/06	01/07	08/07	15/07	22/07	29/07	05/08	12/08	19/08	26/08
Tórshavn Sunnudag	11:00		18/06	25/06	02/07	09/07	16/07	23/07	30/07	06/08	13/08	20/08	27/08


Á veg úr Skotlandi verður lagt at á Tvøroyri

Ringið ella skrivið, so senda vit fleiri upplýsingar


Barnablaðið

Fjórða Barnablaðið í ár er komið út.

Har er m.a. ein samrøða við Signar, sum spælir við í sjónleikinum Framá, annars teir fóstu tættirnir: børnini skriva, tíðindi úttaneftir, myndasøgur, børn tekna, eitt ævintýr, søgur, gaman, skriva mær bræv, krossorð, framhaldssøga o.a. Fuglurin, ið sagt verður frá hesu ferð, er lundin.



Tit ringja – vit skriva



Ringið telefon
11820